## Smágentur druknaðar

Tvær níggju ára gamlar gentur druknaðu, tá tær spældu í fjøruni nærhendis norska býnum Kristiansund í gjárkvøldið. Norska løgreglan sigur, at tríggjar gentur vóru farnar oman í fjøruna at spæla, og at allar tríggjar duttu á sjógvin. Fólk hoyrdu genturnar rópa neyðarróp og fóru til hjálpar. Ein av gentunum bleiv funnin beinanvegin, og hon vísti seg at vera á lívi. Hinar báðar vórðu funnar seinni. Tær vórðu alt fyri eitt fluttar á sjúkrahús, men allar royndir at bjarga lívi teirra vóru til fánýtis, sigur løgreglan. Í morgun savnaðust fólk niðri í fjøruni at minnast tær báðar genturnar, skrivar Aftenposten.



## Palestinar vilja tingast

Palestinsku leiðararnir kunngjørdu í gjár, at teir eru sinnaðir at fara undir óbeinleiðis tingingar við Ísrael við USA sum millumgongumanni. Siga ísraelsmenn tað sama, eru hetta fyrstu tingingar millum partarnar í meiri enn eitt ár, skrivar AP. Teir palestinsku leiðararnir siga seg ikki hava serliga góðar vónir um at fáa nakað burtur úr tingingum við stjórnina hjá Benjamin Netanyahu, forsætisráðharra. Amerikanski varaforsetin, Joe Biden (myndin), skuldi koma til Miðeysturs í dag, har hann fer at eggja palestinum og ísraelsmonnum til at taka tingingarnar uppaftur.



*- Tá tann maritimi parturin av maskinmeistaraútbúgvingini verður styrktur, mugu vit ikki gloyma tann land plaseraða partin, tí hesin mennist og veksur skjótt í okkara grannalondum, segði Páll Hansen*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Vantandi skeið fyri maskinfólk

**- Tað er sera umráðandi fyri okkum, at vit ikki isolera okkum her í Norðuratlantshavi og enda við einum prógvi, sum eingin annar kennir uttan vit sjálvi, sigur Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum**

AÐALFUNDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

- Hóast verandi útbúgvingar á Vinnuháskúlanum helst eru góðar, er veruleikin kortini, at okkara grannalond Noreg, Danmark, Svøríki og Finnland nú øll bjóða bachelorútbúgvingar. Eg veit ikki ordiliga, hvat íslendingar gera. Men tað, sum er sera umráðandi fyri okkum, er, at vit ikki isolera okkum her í Norðuratlantshavi og enda við einum prógvi, sum eingin annar kennir uttan vit sjálvi.

Tað segði Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum, á aðalfundi felagsins leygardagin.

**Breið útbúgving**

Formaðurin vísti á, at tað javnan verður sagt, at maskinmeistaraútbúgvingin er ein sera breið útbúgving.

- Men her mugu vit verða á varðhaldi soleiðis, at tá tann maritimi partin verður styrktur, má tann land plaseraði parturin ikki gloymast. Hesin partur mennist og veksur skjótt í okkara grannalondum.

Páll Hansen segði, at so at siga eingir møguleikar eru fyri eftirútbúgvingum fyri maskinmeistarar í Føroyum.

- Felagið hevur tí havt fund við leiðsluna á Vinnuháskúlanum um at fáa nakað gjørt við hetta, segði Páll Hansen.

# Maskinmenn hugsa eisini um fastlønaravtalu

**Longu í 2008 hevði Maskinmeistarafelagið eitt uppskot um fastlønarsáttmála, sum teir løgdu fyri reiðararnar. - Okkara hugsan var at gera eina fastlønarskipan "omaná" verandi sáttmála, sigur Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum**

AÐALFUNDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Maskinmeistarafelagið hevði aðalfund á Hotel Hafnia leygardagin.

Formaðurin í felagnum, Páll Hansen, stóð ikki fyri vali hesaferð. Einasta broytingin í sjálvari nevndini var, at Petur Egholm ikki er við meiri, og í hansara stað er valdur John Højsted.





*Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum, heldur, at reiðararnir trívast best, tá einki hendir. Hann saknar gjøgnumskygni og opinleika*

*Myndir: Vilmund Jacobsen*

Onkur broyting var eisini í tiltakslimum felagsins.

Næstformaður gjøgnum fleiri ár hevur verið Regin Olsen, men enn hevur nýggja nevndin ikki skipað seg. Tað verður gjørt á fundi, sum nevndin fer at hava fríggjadagin komandi. Á hesum fundi verður eisini næstformaður valdur.

**Fastlønaravtala**

Seinastu tíðina hava bæði Føroya Fiskimannafelag og Føroya Skipara-og Navigatørfelag umrøtt spurningin um fastlønaravtalum fyri fiskimenn.

Á aðalfundi í Maskinmeistarafelagnum leygardagin nam formaðurin, Páll Hansen, eisini við hendan spurning.

Páll Hansen vísti á, at bæði valevnini til formansvalið í Fiskimannafelagnum, Jan Højgaard og Henrik



# Inntøkutrygd tolir at

**Skipaninar við inntøkutrygd eru ymiskar í londunum kring um okkum, og sambært Maskinmeistarafelagnum eigur gamla lógin um inntøkutrygd at tola eina enduskoðan**

AÐALFUNDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í sínari formansfrágreiðing til aðalfundin leygardagin, vísti formaðurin í Maskinmeistarafelagnum á tað, sum ólavsøkupakkin sigur um inntøkutrygd fiskimanna.

- Her verður sagt, at inntøkutrygdin eigur at vera ein spurningur millum avvarðandi vinnufeløg, nevniliga millum Føroya Reiðarafelag og manningarfeløgini. Hvussu inntøkutrygdin verður skipað frameftir, eigur at vera upp til feløgini sjálvi at gera av.

Á aðalfundinum kunnaði Páll Hansen um arbeiðsbólkin, sum settur varð at